# Føroya Tele kærir av ótta fyri skrædli

*Føroya Tele stúrir fyri, at Fjarskiftiseftirlitið hevur álagt fyritøkuni at leiga telefonkervi sítt út fyri ein so lágan prís, at fyritøkan beinleiðis noyðist at leggja pening til, fyri hvønn minutt brúkarar hjá øðrum føroyskum fjarskiftisfyritøkum brúka kervið. Tí verður avgerðin nú kærd*



RÚNAR REISTRUP

Fjarskiftiseftirlitið kann vænta sær at avgerðin, ið eftirlitið tók í ósemjuni millum Føroya Tele og nýggju fjarskiftisfyritøkuna Alnót, verður kærd.

Føroya Tele stúrir nevniliga fyri, at minuttprísirnir, ið avgerðin ásetti, eru so lágir, at teir eru undir kostnaðarprís. Eru teir tað, merkir tað fyri Føroya Tele, at fyri hvønn minutt viðskiftafólk hjá til dømis Alnót brúka fjarskiftiskervið, missir almenna telefyritøkan pening.

– Vit eru ikki nøgdir við avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum og vit eru als ikki nøgdir við framferðarháttin hjá eftirlitinum, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, sum í farnu viku varð álagt at loyva øðrum fjarskiftisveitarum inn á fjarskiftiskervið í Føroyum fyri ein prís, ið lá nakað væl undir tí, sum almenna parta felagið sjálvt hevði skotið upp.

**Semja var frammanundan**

Tað, sum Føroya Tele serstakliga er ónøgt við, er at tann avtalan, sum fyritøkan fyrr í ár, við Fjarskiftiseftirlitinum sum semingshjálp, samráddi seg fram til við eina aðra telefyritøku, varð skúgvað til viks við avgerðini hjá Fjarskiftiseftirlitinum í ósemjuni millum Føroya Tele og Alnót.

– Vit hildu at vit høvdu samrátt okkum fram til eina avtalu, sum allir partar kundu liva við. Og sum vit skiltu á Fjarskiftiseftirlitinum tá, so var sloppið nú, og avtalaði prísurin kundi brúkast sum grundarlag í framtíðar samráðingum millum Føroya Tele og aðrar fjarskiftisveitarar.

Avtalan ásetti, at aðrir fjarskiftisveitarar skuldu gjalda Føroya Tele ávikavist 9 oyru um minuttin í dagtímunum og 6 oyru um minuttin í kvøld- og náttartímunum fyri at brúka fjarskiftiskervið.

**Avgerðin sett til viks**

Men við avgerðini hjá Fjarskiftiseftirlitinum í málinum millum Føroya Tele og Alnót, varð ásett, at Alnót skuldi gjalda Føroya Tele ávikavist 7,7 og 4,8 oyru fyri hvønn minutt ein kundi hjá Alnót er á netinum. Hesir takstir fara í næstum at gerast galdandi fyri hinar fjarskiftisveitararnar, ið hava avtalu við Føroya Tele.

– Hatta ljóðar kanska ikki av nógvum, men talan er um nógvar milliónir av minuttum, og tá er eitt oyra pr. minutt knappliga nógv, sigur Andras Róin.

– Vit stúra fyri at ásetti minuttprísurin kanska er lægri enn tann prísurin, sum tað kostar Føroya Tele at „framleiða" minuttirnar.

Um so er, so fáa vit beinleiðis undirskot av at aðrar fyritøkur brúka fjarskiftiskervið, og tað kann hava katastrofalar fylgjur fyri Føroya Tele og alla ta føroysku fjarskiftisvinnuna, sigur stjórin á Føroya Tele.

**Kann geva afturslag**

Eftir hansara tykki hevur Fjarskiftiseftirlitið lagt seg eftir at byrja á tí kostnaðarstøði, sum fjarskiftið er á í hinum Norðurlondunum. Og her liggur ein av grundleggjandi ósemjunum millum almennu fjarskiftisfyritøkuna og Fjarskiftiseftirlitið. Føroya Tele heldur fast við at tað er dýrari at reka fjarskiftistænastur í Føroyum enn í teimum størru grannalondunum, men Fjarskiftiseftirlitið heldur at eingin geografisk forðing er fyri at Føroyar kunnu koma niður á sama kostnaðarstøði sum hini Norðurlondini.

– Vit halda at man skal „klappa hestinum" eitt sindur í fyrstu atløgu og so síggja hvussu tað gongur. Stóri vandin við at minuttprísirnir nú eru settir so langt niður er, at Føroya Tele um eitt ár ella so kanska kann skjalprógva, at fyritøkan hevur lagt pening til tá hinir fjarskiftisveitararnir hava brúkt fjarskiftiskervið.

Og tað hevði verið einki minni enn ein vanlukka fyri nýggju veitararnar, sum so knappliga skuldu goldið hægri minuttprís við afturvirkandi kraft. Tað kann gerast ein rættiliga stór rokning, ávarar Andras Róin, stjóri á Føroya Tele.

# Bretland dregur føroysk lesandi

*Lestrarmynstrið hjá føroyingum er í broyting. Fólk fara nú í størri mun út um danska landamarkið at nema sær útbúgving, men oftast fara tey ikki longur enn til Bretlands, har útbúgvingarmøguleikarnir eru ríkir*

RÚNAR REISTRUP

Alsamt fleiri føroyingar søkja Stuðulsstovnin um stuðul til lestur uttan fyri Norðurlond. Hesins stuðul verður veittur ígjøgnum ta sonevndu ÚSUN skipanina, har stuðul og lán verða latin til skúlagjald hjá føroyskum lesandi uttan fyri Norðurlond.

Í løtuni veitir Stuðulsstovnurin stuðul ígjøgnum ÚSUN skipanina til eini 60 føroysk lesandi uttan fyri Norðurlond, og tað er meir enn tað hevur verið hesi tíggju árini, síðan skipanin varð sett í verk.

Hans Andrias Dam Joensen er skrivari í ÚSUN nevndini, ið millum annað hevur sum arbeiðsøki at viðgera innkomnu umsóknirnar til stuðul ígjøgnum ÚSUN skipanina.

Hann hevur í seinastuni sæð ein alsamt skjótari vøkstur í talinum av umsóknum.

– Vit hava sæð hesa seinastu tíðina, at fleiri og fleiri fólk velja at fara aðrastaðni enn til Danmarkar at lesa. Tað vísisr seg at tað tekur tíð at broyta lestrarvanarnar hjá fólki, og talið á umsóknum er higartil ikki vaksið so nógv sum vit høvdu væntað, men nú sær út til at tað er komin eitt sindur av gongd á, sigur skrivarin í ÚSUN nevndini.

**Bretskt er lætt**

Í løtuni letur Stuðulsstovnurin ÚSUN stuðul til fólk í USA, Týsklandi, Fraklandi, Australia og Bretlandi.

Nógv tey flestu av hesum eru stødd í Bretlandi, har tey harafturímóti eru spjødd kring nógvar ymiskar býir í Englandi og Skotlandi.

– Tað hongur helst saman við at tey kenna seg heima í bretskum máli og tí ikki hava teir stóru málsligu trupulleikarnar at dragast við har. Men Bretland er eisini eitt land við sera ríkum lestrarmøguleikum, so tað er ikki so løgið at tey flestu fara hagar, heldur Hans Andrias Dam Joensen.

**Bæði ÚSUN og SU**

Stuðulsstovnurin hevur við ÚSUN skipanini møguleika at veita føroyskum lesandi uttan fyri Norðurlond upp til 60.000 krónur til skúlagjald um árið. Harumframt fáa hesi lesandi vanligan mánaðarstuðul til lesandi frá danska SU.

Nakrar útbúgvingar kosta undir 60.000 krónur um árið, og tey føroysku lesandi á hesum útbúgvingum sleppa tá undan at gjalda nakað sjálvi.

Men summar aðrar útbúgvingar kosta so mikið sum tvífalt ta upphædd, ið ÚSUN skipanin letur til skúlagjald, og tá kann tað kortini gerast fíggjarliga svárt hjá teimum lesandi at megna at gjalda fyri skúlan.

Tá ber til hjá teimum at taka lestrarlán ígjøgnum ÚSUN skipanina fyri at gjalda tað, ið restar í av skúlagjaldinum.

**Ráðgeving vantar**

Fíggjarliga hjálpin til føroyingar, ið velja at bróta gamlan sið og fara út um Danmark at lesa, kann tískil ikki sigast at vera annað góð.

Verri er statt við ráðgevingini til hesi somu lesandi. Ofta er tað eitt nokkso tungt arbeiði at søkja inn á útbúgvingar uttan fyri Danmark og fáa tey formellu viðurskiftini í lag annars. Tí er tað sambært skrivaranum í ÚSUN nevndini brúk fyri eini ráðgeving í Føroyum, sum kann hjálpa við teimum meira formellu viðurskiftunum, ið skulu fáast í lag tá lesandi fara út um ríkið at nema sær hægri útbúgving.

Sum skilst verður í løtuni arbeitt við at fáa eina slíka ráðgeving, helst í sambandi við Fróðskaparsetrið.



# Tórshavn og Stavanger gjørt samstarvsavtalu

*Ætlanin við avtaluni er at fremja búskaparligan vøkstur og vinnulívsmenning hvør hjá øðrum, umframt at knýta tættari mentanarlig bond millum býirnar*

**Stefan í Skorini**

Leivur Hansen, býráðsformaður, og Leif Johan Sevland skrivaðu 23. august undir samstarvsavtalu millum býirnar Tórshavn og Stavanger í Noregi.

Grundin til at avtalan er komin í lag er, at býirnar hava felags áhugamál, tá oljuvinnuni umræður. Eisini hava býirnir felags vinnulívssøgu við fiskiskapi og góðsking av fiski.

Avtalan hevur millum annað til endamáls, at leggja eitt tættari samstarv millum vinnurnar til rættis. Eisini er ætlanin at skapa møguleikar fyri vinnu- og íløgumøguleikum bæði innan oljuvinnuna og aðrar vinnur.

Umframt tað er ætlanin at samstarva á granskingarøkinum og innan hægri útbúgvingar.

Ein samstarvsnevnd verður vald við seks umboðum frá hvørjum býi, og henda nevndin skal møtast einaferð um árið. Í nevndini eru umboð fyri býráðið, umsitingina og vinnulívið frá báðum býunum.

Í røðu sínari í Stavanger, tá avtalan varð undirskrivað, legði Leivur Hansen dent á, at Havnin í framtíðini fer at hava ein stóran leiklut í oljuvinnuni, og tí er neyðugt at vera fyrireikaður.

Havnin samstarvar longu við Aberdeen, og harvið hevur høvuðsstaðurin fingið avtalur í lag við tveir av teimum týdningarmiklastu oljubýunum í Norðureuropa. Soleiðis kann Havnin sleppa undan at gera somu mistøk sum Aberdeen og Stavanger hava gjørt.

Umframt at vísa á tað samstarv, sum longur er millum skúlar í báðum býunum, nevndi Leivur Hansen eisini ta felags søguna, sum Føroyar og vesturlandið í Noregi hava.

# Einki at óttast í Føroyum

*- Í Danmark mugu vit altíð stongja hurðina um náttina. Í Føroyum er slett ikki so vandamikið, sigur Loke Dupont, sum saman við flokksfeløgum vitjar áttanda flokk á Sandoynni*

STEFAN Í SKORINI

Ein riðil av skúlabørnum datt inn á gólvið á Sosialinum hósmorgunin. Hetta vóru næmingarnir úr 8. flokki á Sandoyar Miðnámsskúla og úr Enghavegård Skole í Gladsaxe, sum er beint uttanfyri Keypmannahavn. Tey leggja tó dent á, at tey uttan iva eru københavnarar.

Tann morgunin vóru tey á veg í tinghúsið, har sandoyartingmaðurin Páll á Reynatúgvu skuldi vísa teimum runt í tí føroyska parlamentinum.

Næmingarnir skulu næstu tvær vikurnar uppliva føroysku náttúruna, mentanina og vanligt bygdalív á Sandoynni.

**Bergtakandi náttúra**

Vit fingu eitt prát við 14 ára gamla Loke Dupont og læraran, Grete Altmann.

Tey siga sum við ein munn, at náttúran her er bergtakandi og ómetalig, tá tey verða spurd, hvat er mest merkisvert við Føroyum. Hetta er nakað heilt annað enn tað, tey eru von við á flatlondum.

Tað er eisini sera stórur munur á dagliga lívinum her í Føroyum og í Gladsaxe.

- Niðri í Danmark standa fólk næstan við eini byrsu innanfyri hurðina, meðan fólk her ikki steingja hurðina um náttina, sigur Loke, sum leggur afturat, at fólk her eru so ómetaliga gestablíð.

Um bygdalívið á Sandoynni sigur Loke, at tað víkir sera nógv frá tí, sum hann er vanur við í København, men hann leggur afturat, at tað als ikki er keðiligt, men bara sera øðrvísi.

Hóskvøldið var flokkurin og sá AB spæla ímóti B36 á Tórsvølli. AB er fótbóltsfelagið í Gladsaxe, so eingin ivi var um, hvønn tey stuðlaðu hóskvøldið, og AB vann eisini 9-0 samanlagt.

Danski flokkurin steðgar í Føroyum í tvær vikur, áðrenn tey fara avstað aftur við Norrønu, sum tey eisini komu upp við. Meðan tey steðga í Føroyum, búgva tey privat hjá hinum næmingunum. Tey eru spjadd runt oynna, og tey búgva í Húsavík, Skálavík, Skopun og á Sandi.

Ferðin er komin í lag ígjøgnum tveir av næmingunum í tí danska flokkinum, sum eru føroyingar. Samband hevur verið millum flokkarnar í eitt ár, har tey hava havt brævasamband. Næsta ár er so ætlanin, at sandoyingarnir skulu leggja leiðina til Gladsaxe og vitja donsku skúlabørnini.

Flokkurin hevur fingið stuðul frá einum norðurlendskum grunni til ferðina, og tí eru tey sloppin bíliga.




*Donsku og føroysku næmingarnir uttanfyri Sosialin, áðrenn leiðin gekk oman í tinghúsið*

Mynd: Jonhard Hammer


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.
Skrás.: 30-04-98 Km.: 24.000
Prísur: 167.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 STW.
Skrás.: 01-06-92 Km.: 82.000
Prísur: 62.600,- Sýnaður 8/00

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli AUT. GEAR
Skrás.: 13-06-96 Km.: 82.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 STATION
Skrás.: 13-04-92 Km.: 110.000
Prísur: 57.600,- Sýnaður 2/99

TOYOTA CARINA E 1,6 Xli
Skrás.: 30-01-96 Km.: 48.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA YARIS 1,0 TERRA
Skrás.: 07-05-99 Km.: 30.000
Prísur: 112.600,- Garanti**

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.
Skrás.: 03-04-96 Km.: 122.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

TOYOTA YARIS 1,0 TERRA
Skrás.: 21-04-99 Km.: 26.000
Prísur: 118.600,- Garanti**

TOYOTA CARINA E 1,8 CDX
Skrás.: 16-05-97 Km.: 42.000
Prísur: 125.600,- Garanti*

TOYOTA STARLET 1,3, 3 HURÐ.
Skrás.: 25-07-96 Km.: 53.000
Prísur: 72.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,8 Gli
Skrás.: 28-06-95 Km.: 72.000
Prísur: 108.600,- Garanti* Sýnaður 12/99

VOLVO 460 SEDAN
Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000
Prísur: 48.600,- Sýnaður 6/99

TOYOTA CARINA E 2,0 GLi SEDAN
Skrás.: 17-08-92 Km.: 95.000
Prísur: 85.600,- Garanti*

HONDA CIVIC 1,4
Skrás.: 07-04-97 Km.: 52.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2.0 Gli Sýnaður 3/00
Skrás.: 02-07-90 Km.: 170.000
Prísur: 65.600,-

PEUGEOT 406
Skrás.: 10-02-96 Km.: 110.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Gli L/B
Skrás.: 14-08-91 Km.: 69.000
Prísur: 72.600,- Garanti* Sýnaður 5/99

FORD ESCORT 1,8 T-DIESEL STW.
Skrás.: 08-10-97 Km.: 24.000
Prísur: 132.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 Xli
Skrás.: 27-07-92 Km.: 131.000
Prísur: 58.600,- Sýnaður 5/99

OPEL ASTRA 1,8 STATION
Skrás.: 09-11-95 Km.: 71.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Xli
Skrás.: 19-10-90 Km.: 122.000
Prísur: 57.600,-

FORD ESCORT 1,8
Skrás.: 21-08-95 Km.: 81.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000
Prísur: 128.600,- Garanti**

FORD MONDEO 2,0 AIR-CON
Skrás.: 02-07-96 Km.: 52.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA
Skrás.: 16-03-98 Km.: 50.000
Prísur: 112.600,- Garanti**

KIA SEPHIA 1,5
Skrás.: 17-04-97 Km.: 59.000
Prísur: 68.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA
Skrás.: 01-05-95 Km.: 139.000
Prísur: 87.600,- Garanti* Sýnaður 12/99

VOLVO 240 GL AUT.
Skrás.: 04-06-86 Km.: 165.000
Prísur: 22.600,-

VØRUVOGNAR

TOYOTA LANDCRUISER 4,0 TURBO
Skrás.: 20-10-88 Km.: 159.000
Prísur: 99.600,- Sýnaður 8/00

NISSAN PATROL 4x4
Skrás.: 01-07-89 Km.: 197.000
Prísur: 55.600,- Sýnaður 12/98

TOYOTA DYNA 150 V/LAST
Skrás.: 24-02-97 Km.: 100.000
Prísur: 90.600,-

MITSUBISHI PAJERO 4x4 STUTTUR
Skrás.: 22-10-86 Km.: 238.000
Prísur: 38.600,- Sýnaður 7/00

TOYOTA LANDCRUISER 2,4 DIESEL
Skrás.: 05-11-86 Km.: 230.000
Prísur: 48.600,-

FORD COURIER DIESEL
Skrás.: 22-05-94 Km.: 91.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA HILUX 4x4 DUP. CAP
Skrás.: 03-08-95 Km.: 68.000
Prísur: 120.600,-

VW LT 35 VAN
Skrás.: 30-06-93
Prísur: 39.600,-

AVHEINTINGARTILBOÐ

TOYOTA CARINA 1,6 XL SEDAN
Skrás.: 19-10-87 Km.: 175.000
Prísur: 7.000,- Sýnaður 10/98

FORD ESCORT
Skrás.: 14-03-88 Km.: 177.000
Prísur: 9.000,- Sýnaður 3/99

FORD SIERRA 1,6
Skrás.: 10-05-89 Km.: 110.000
Prísur: 15.000,- Sýnaður 5/00

FORD ESCORT
Skrás.: 18-06-87 Km.: 168.000
Prísur: 8.000,- Sýnaður 5/99

HONDA ACCORD
Skrás.: 09-04-87 Km.: 179.000
Prísur: 14.000,- Sýnaður 5/98

OPEL ASCONA 1,6
Skrás.: 01-01-87
Prísur: 3.000,-

NISSAN BLUEBIRD
Skrás.: 12-06-87 Km.: 157.000
Prísur: 12.000,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00





Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820